## Íverksetarahús í Klaksvík verður alment sett á stovn



Eftir at hugskotið um íverksetan og íverksetarahús í Klaksvík kom, er kjakað millum vinnulívsfólk, Menningardeildina hjá kommununi og Vinnulívsráðið í Klaksvík endað við, at tað skal verða Klaksvíkar kommuna, sum setur íverksetarahúsið alment á stovn. Hetta verður gjørt alment hósdagin 24. mai klokkan 10 í býráðshøllini í Klaksvík. Virksemið byrjaði við eini verkætlan í samstarvi við Birc Estate í Herning, og verkætlanin fór av bakkastokki 15. januar á einum íverksetarakvøldi í mentannarhúsinum Atlantis. Síðani tá hava tvey fullteknað skeið í íverksetan verið hildin. Um somu tíð hava slakir 30 íverksetarar higartil leitað sær ráðgeving í Íverksetarahúsinum. Trý íverksetaranetverk eru eisini higartil virkin í húsinum. Fleiri verkætlanir fara væntandi í gongd í næstum, og so skjótt sum hølini verða tøk, fara íverksetarar at kunna leiga høli í Íverksetarahúsinum.

# Føroyingar í Hanstholm skornir í andlitið

**Farna mikudag vórðu tveir føroyingar fyri sera ógvusligum harðskapi í Hanstholm. Menninir vórðu skornir í andlitið og bukaðir upplýsir danska løgreglan, sum hevur handtikið og varðhaldsfongslað ein 32 ára gamlan mann**







*Thisted Dagblad ella Nordjyske, sum tað eisini eitur, skrivaði saman við Danmarks Radio í Norðurjyllandi um ógvusliga harðskapin móti tveimum føroyingum í Hirtshals*

HARÐSKAPUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Mikudagin í farnu viku var ein ógvusligur tilburður í einum raðhúsum í Bygmarken í Hanstholm. So ógvusligt var tað, at fleiri grannar ringdu til løgregluna og boðaðu frá, at tað yvirhøvur ikki ruggaði rætt í einum húsi, har ein føroyingur í fimmtiárunum búði.

Tað var um náttúrðatíð – klokkan hálvgum sjey – at løgregla og sjúkrabilar komu á staðið. Har funnu tey tveir mans, sum vóru bukaðir og skornir í andlitið. Lokala avísin Thisted Dagblad skrivaði, at »begge havde voldsomme snitsår i ansigterne«, og løgreglan í Thisted váttar fyri Sosialinum, at so er.

– Talan er um rættiliga grovan harðskap, har tveir føroyingar eru skornir í andlitið. Helst er tað við eini fløsku, men tað vita vit ikki við vissu enn. Somuleiðis hava teir fingið skaðar aðrastaðni á kroppin, og eisini brotið riv av sløgum ella spørkum, upplýsir løgreglan í Thisted.

**Mist sjónina**

Teir báðir menninir vórðu beinanvegin fluttir á sjúkrahúsið í Thisted, og løgreglan har upplýsir fyri Sosialinum, at annar teirra síðani er fluttur til sjúkrahúsið í Århus. Tað vísir seg, at hesin hevur fingið so álvarsligar skaðar av álopinum, at hann hevur mist sjónina í øðrum eyganum, men hesum fara tey at royna at bjarga á sjúkrahúsinum í Århus.

**Varðhaldsfongslað 32 ára gamlan mann**

Eftir tilburðin varð ein 32 ára gamal maður úr Hanstholm handtikin. Hesin var í raðhúsinum, tá løgreglan kom á staðið. Hósdagin varð hann grundlógaravhoyrdur í rættinum í Holstebro. Har játtaði hann, at hava verið á staðnum hetta kvøldið, men hann segði seg ikki minnast hvat var hent. Dómarin gjørdi av at varðhaldsfongslað mannin í fýra vikur.

Teir báðir føroyingarnir eru eisini avhoyrdir í málinum, og tað sama er ein fjórði maður, sum eisini varð álopin í raðhúsinum. Hesin er um sama aldur sum teir báðir føroyingarnir, og fekk eina fløsku í høvdið hetta kvøldið.

**Gera tekniskar kanningar**

Danska løgreglan dugir í verandi løtu ikki at siga, hví tað gekk sum tað gekk í einum raðhúsum í Bygmarken í Hanstholm mikukvøldið í farnu viku. Teir gera í løtuni tekniskar kanningar á bústaðnum, og leita somuleiðis eftir vápnunum, sum brúkt eru. Her hevur løgreglan ein sterkan illgruna um, at tað er ein knúst fløska, sum er brúkt at skera menninar í andlitið við. Hetta er tó ikki endaliga staðfest, hóast Thisted Dagblad skrivar, at »druk endte med grov vold og snit med flaske«.

Hósdagin í farnu viku endurgav Danmarks Radio í Norðurjyllandi vakthavandi hjá løgregluni í Thisted fyri at siga, at føroyingarnir eru 53 og 56 ára gamlir og búsitandi í Hanstholm. Hetta hava vit ikki fingið endaliga staðfest, men løgreglan í Thisted upplýsir, at teir báðir eru føddir í 1953 og 1949.

Sosialurin skilir, at í hvussu so er annar av føroyingunum áður hevur havt ávísar trupulleikar við rúsdrekka, men hetta vil løgreglan í Thisted hvørki vátta ella avsanna.

# Valstríðið skal vera stutt og tætt

**Samgongan umhugsar at broyta vallógina so at valstríðini verða styttri**



LØGTINGSVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samgongan arbeiðir við tankanum um at broyta vallógina.

Men talan er ikki um at broyta talið á valdømum.

Hinvegin er talan um at gera smærri broytingar. Og ein broyting er at stytta tíðarfreistina fyri, hvussu skjótt tað skal bera til at útskriva val.

Sum støðan er nú, skulu minst seks vikur ganga, tá tí, at væl er útskrivað, til valið kann vera.

Tað, sum samgongan nú hugsar um, er at stytta tíðarfreistina niður í tríggjar vikur.

At hava valstríð í seks vikur er í so leingi, heldur Jóannes Eidesgaard.

*- Tað er nógv, sum talar fyri, at tað er betri, at valstríðini verða munandi styttri enn tey eru nú og tað arbeiðir samgongan við, sigur løgmaður*

- Tað er torført føra eitt eldhugað valstríð í heilar seks vikur og tí er stórur vandi fyri, at valstríðið verður útvatnað og at tað í ov stóran mun fer at snúgva seg um annað enn tey veruligu, politsku málini, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann vísir á, at uppundir seinasta løgtingsval vardi veruliga valstríðið ikki meiri enn tríggjar vikur.

- Tað var eitt fínt valstríð, tí tað var stutt, intenst og tætt.

Tí heldur hann, at nógv talar fyri, at tað er rætt at freistin fyri, hvussu long tíð skal ganga, frá tí at val verður útskrivað, til tað kann haldast, verður stytt úr seks vikum, niður í tríggjar vikur fyri at avmarkað valstríðið.

**Løgtingsval 19. januar**

Annars staðfestir løgmaður enn einaferð, at løgtingsval verður ikki fyrrenn í allar síðstu løtu.

Eftir lógini skal løgtingsval vera í seinasta lagi 20. januar. Men av tí at tað er sunnudagur, verður valið ístaðin leygardagin 19. januar, sigur løgmaður.

- Eg havi sett ein reyðan ring rundanum leygardagin 19. januar.

Hann hevur onki ímóti einum leygardagsvali.

So kunnu tey, sum vinna valið, hátíðarhalda tað og tapararnir brúka sunnudagin til umhugsunnar, uttan at hugsa um, at arbeiðsdagur er dagin eftir.

Men hesum er andstøðan á Løgtingi alt annað enn samd í, tí hon vil hava val í heyst.

Seinast, Løgtingið umrøddi valdagin, vildi Jenis av Rana úr Miðflokkurin sleppa undan valstríði á jólum. Hann helt eisini, at verður valið ikki í hampiligari tíð fyri ársskiftið, fer tað at gera fortreð fyri fíggjarlógina. Tí helt hann, at var hóskandi at hava val í november.

Høgni Hoydal Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, helt, at tað var óheppið at hava val fyrst í januar, tí tað fer at bera illa til at samtykkja eina skilaliga fíggjarlóg mitt í einum valstríði og tí mælti hann til, at valið verður í september, ella í seinast lagi í oktober.

Partamaður hansara, Tórbjørn Jacobsen vísti eisini á vandan fyri eini útgjaring á fíggjarlógini, skal hon snikkast saman mitt í einum valstríði.